Skuggamyndir

Skuggamyndir eftir Ingun Christensen er ein stafett, har sjónarhornið í næstu søguni er hjá einum av persónunum, sum er høvuðspersónur ella verður nevndur í søguni frammanundan. Soleiðis fáa vit lýst persónarnar bæði úr einum innari og einum ytri sjónarhorni. Vit fáa at vita, hvørjar hugsanir onnur hava um tann persónin, sum vit júst hava lisið um ella øvut, vit fáa lýst persónarnar uttaníframá, og so lesa vit teirra søgu. Talan er um sjálvstøðugar søgur, men søgurnar hanga saman, so eg fari at bólka savnið sum eina skaldsøgu. Tú fært onga heildarmynd og als onga dýpd, um tú ikki lesur allar søgurnar í savninum sum eina heild, men grafiskt er bókin sett upp sum eitt stuttsøgusavn, sum innihaldsyvirlitið, ið tíverri hevur skeiv síðutøl, greitt bendir á. Frásøgupallurin er ein bussur við ferðafólkum, sum hava hvør sína søgu. Søgurnar byrja tó heima í kjallarakamarinum hjá einum ungum dreingi, har gentan er flutt inn. Á veg í skúla gerast tey ferðafólk í bussinum, og soleiðis byrjar frásøguumfarið. Bussurin er myndliga væl valdur, tí tað gevur søguni ferð og lýsir lívið sum eina ferð gjøgnum ein tilvildarligan morgun saman við tilvildarligum fólkum. Summi teirra hittast tó hvønn morgun og hava gjørt sær tankar og søgur um hini í bussinum. Tað knýtir tey í flestum førum saman og er grundarlag undir teimum tankum og

gerðum, sum tey fremja í løtuni. Søgutíðin er tann stutta tíðin, fólk eru í bussinum á veg í skúla ella til arbeiðis, men sagda tíðin er ymisk frá søgu til søgu. Hon verður lýst gjøgnum hugarenslið á høvuðspersóninum í hvørjari søgu sær.

Ymisk lív og ymisk sjónarmið hittast í bussinum. Í søguni "Gráhærdi maðurin" kemur frøkun Sørensen og setur seg undir liðina á gráhærda manninum. Hon er fráfarin lærarinna og er bonsk og grimm í útsjónd og í sínum dómi yvir onnur. Ein ung genta og ein ungur drongur í bussinum hava verið næmingar hjá henni. Dreingin heldur hon hánt um, tí hann var ein av teimum óstýriligu næmingunum í skúlanum. Gentan var ein góður næmingur, men hevur fingið tvey børn og er einsamøll mamma, og tað heldur frøkun Sørensen ómetaliga lítið um. Hon kemur við niðrandi viðmerkingin til gentuna, snýsandi og við nøsini beint upp í loft sigur hon: "So dugnalig í skúlanum, og har stendur hon nú". Gráhærdi maðurin hugsar við sær sjálvum, at henda sama genta er fitt, vinalig, gløgg og vælviljandi. Hann hittir hana javnan, tí hon arbeiðir á eldrabýlinum, har minnisveika kona hansara býr. Ein greið mynd fyri, hvussu vit síggja ymisk sjónarmið møtast. Men lívið er meira samansett enn so. Frøkun Sørensen er beisk, tí hon í ungdómsárunum brendi seg. Hon møtti kærleikanum, gjørdist við barn, mátti lata tað burtur og varð so dyggiliga svikin av kærleikanum. Hon kennir seg sjálva aftur í einsamøllu mammuni, og tað er týðiliga orsøkin til, at hon heldur lítið um

hennara val í lívinum. Soleiðis fáa vit lýst fleiri lívsleiðir í bussinum. Í “Kvinnan í reyða regnfrakkanum” hitta við konuna, sum maðurin bukar og sum umhugsar at rýma frá honum. Hon hevur eitt kensluløtt samband við ungan mann, sum hvønn morgun vísir henni uppmerksemi. Hansara søga er, at hann hevur eitt móðurkompleks, tí mamma hansara hevur svikið hann, og tað er greitt orsøkin til, at hann keðir seg saman við teimum ungu, vøkru gentunum, sum flokkast uttan um hann, men heldur følir seg drignan at konuni í reyða frakkanum. Hann roynir á ymsan hátt at koma í samband við hana, men hon torir ikki at lata hann nærkast. Søgan teirra millum endar tó við, at útlit eru fyri, at “okkurt” fer at henda teirra millum, og opni spurningurin er, um hon kanska fer at taka seg saman at rýma úr harðliga og sálarliga lemjandi hjúnalagnum. Onnur søga snýr seg um samkyndan mann, sum hevur livað í barnleysum hjúnalagi. Nú konan er deyð, roynir hann at liva tað lívið, sum er rætt fyri hann. Hann forelskar seg í tí unga manninum, sum fegin vil nærkast konuni, sum kundi verið mamma hansara. Soleiðis snýr bókin seg eisini um, hvussu ymsir vegir krossast, og hví fólk liva tað lívið, tey nú einaferð gera. Tilvild tykist svarið í skaldsøguni at vera. Hesi fólkini verða sett saman av tilvild ein tilvildarligan morgun á veg út í dagin við ógvuliga ymsum lívsførningi í skjáttuni.

Tann ungi kærleikin, sum vit lesa um í fyrstu søguni í savninum, er byrjanin til lívsins mongu og mangan truplu og samansettu

leiðir. Vit síggja, hvussu fólk sita og eygleiða og gera sær tankar um, hví fólk eru, sum tey eru, og so fáa vit teirra søgu og at vita, hví lív teirra nú einaferð er, sum tað er.

Bókin “Skuggamyndir” er ein væl skrivað fyrstaroynd, sum tó saknar størri dýpd. Ymsu lívini úr ymsum sjónarhornum eru listfrøðiliga styrkin í skaldsøguni og gera hana áhugaverda at lesa. Málsliga er hon sera væl frágingin. Skuggamyndir er væl egnað í undirvísingarsamanhangi, tí hon so væl kann brúkast saman við greiningarfrymlum, t.d. eru pallsetingin, frásøgusnildið, sjónarhorn og persónslýsingar uppløgd evni at viðgera. Evnisliga er hon eisini væl egnað, tí hon úr ymsum sjónarhornum viðger ymisk lív og ymsar aldrar í nútíðarsamfelagnum. Fløkti ungdómskærleikin, sum savnið byrjar við, ger søguna afturkenniliga hjá næmingum í elstu flokkum fólkaskúlans og fyrsta árið á miðnámi, og tí kann avgjørt mælast til at brúka bókina har.

Vár í Ólavsstovu